Sjúkrarøktaretiska Ráðið

# ÁRSFRÁGREIÐING 2024





# INNIHALD


**Ársfrágreiðing 2024** 5

**Etiskt truplar støður lýstar við stuttsøgum** 6

**Bókaútgáva** 6

**Bloggarí** 7

Hevur tú hug at blogga fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðið? 7

Umsorgan í modernaða heilsuverkinum 7

**“Samvitskuparagraffin” í lógaruppskotinum um fosturtøku** 10

Áseting í lógina um undantøku fyri heilsutarvsfólk til at fremja ella luttaka í fosturtøku? 12

Fyri og í móti undantøkuáseting í fosturtøkulógina 12

**Rúm til refleksjón** 15

**Etikk-kveikjara net** 15

**Samstarv við Fá6** 16

**Fyrsta verkstovan við etikk- kveikjarum** 17

**Talgild refleksjón** 18

**Temadagur við Dorthe Birkmose saman við FPS** 18

**Norðurlendskt samstarv** 20

Tá vanlukkan rakar 20

Sjúkrarøktarfrøðingar hava ein týdningarmiklan leiklut 20

Hvør tekur sær av sjúkrarøktarfrøðinginum? 21

Etiskar tvístøður í miðdeplinum 21

Vitjan á Utøya 22

Felags yvirlýsing 23

**Kari Martinsen** 25

**Poddar** 26

**Youtube** 26

**Nevndarval** 26



# ÁRSFRÁGREIÐING 2024

Sum vant, byrjaði árið við einum heildags fundi, har vit eftirmettu árið ið fór og løgdu ætlanir fyri árið, ið stóð fyri framman. Millum mangt annað var ein niðurstøða og læring frá undanfarna árið, at best er at leggja tiltøk um dagin, tí undirtøkan til kvøldartiltøk er ov løk.

# ETISKT TRUPLAR STØÐUR LÝSTAR VIÐ STUTTSØGUM

Sum eitt grundarlag fyri planlegging av komandi tiltøkum og átøkum, høvdu vit býtt allar stuttsøgurnar, sum komu inn í samband við stuttsøgukappingina, millum okkara, fyri at greina hvørjar truplar støður og tvístøður kundu lesast burturúr tekstunum.

Burturúr rúgvuni, valdu vit at fara víðari við palliatión. Men av tí at FáG stutt eftir lýsti vi einum sera áhugaverdum temadegi um júst palliatión, umframt at Eldraráðini fyri Norðoyggjar og Eysturoynna í februarmánað skipaðu fyri almennum fundi í Løkshøll, har palliativ viðgerð í Føroyum var til viðgerðar, mettu vit tað óneyðugt at seta sjóneykuna á evni eisini. Stuttsøgurnar eru tó til áhaldandi íblástur til arbeiðið okkara og vit kunnu bara enn einaferð eyðmjúkt takka tykkum, sum hava sent okkum tekstir.

# BÓKAÚTGÁVA

Longu í 2023 fóru vit í samstarv við Sprotan, fyri at geva stuttsøgurnar út í bók. Hóast drúgt arbeiði, bar ikki á mál og heittu vit tí á høvundarnar um, at senda tekstirnar til aðra útgávu, sum t.d. Varðan og Vencil. Súsanna Funding. sum átti vinnarasøguna í stuttsøgukappingini "Stjørnan á himmalhválvinum", og Joan Kristina Olsen, sum eigur yrkingina "Hondin", hava tikið hesa áheitanina til eftirtektar, og eru at finna í nýggjasta Varðanum. Vala tekstir, sum røra hjartastreingir.

# BLOGGARÍ

Ein týðandi liður í virkisøkinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum, er at miðla sjúkrarøkt. Sjúkrarøktarfrøðingar hava tí ein týdningarmiklan leiklut í at kunna almenningin um týdningin av sjúkrarøkt. Við at skriva tekstir, sum lýsa arbeiðið, fakligu vitanina og virðini handan sjúkrarøktina, kunnu teir bæði skapa størri virðing fyri fakinum og betri skilja týdningin av dygdargóðari røkt fyri einstaklingar og samfelagið.

Í februar avgjørdi SER tí at fáa sær ein bloggpall og eggja sjúkrarøktarfrøðingum til at senda tekstir inn.

## HEVUR TÚ HUG AT BLOGGA FYRI SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ?

### ERT TÚ SJÚKRARØKTARFRØÐINGUR ELLA SJÚKRARØKTARFRØÐILESANDI OG HEVUR HUG AT BLOGGA FYRI SJÚKRARØKTARETISKA RÁÐIÐ?

*Bloggurin skal snúgva seg um sjúkrarøktaryrki ella tað at verða sjúkrarøktarfrøðingur í breiðum týdningi. Hann hevur ikki fyri neyðini at snúgva seg um etikk og kann bæði verða álvarsamur, stuttligur, spískur, speiskur ella júst soleiðis, sum tú heldur hann skal vera. Hann skal tó í øllum førum vera siðiligur og í ongum føri ófantaligur, speirekandi ella særandi.*

*Tú bindur teg ikki til at skriva meira enn tann eina bloggin. men er vælkomin at skriva fleiri. Bloggurin verður útgivin á heimasíðuni hjá FFS og annars á sosialu pallum okkara. Um vit halda, at onkur bloggur eigur at røkka longri, verður tað gjørt í samráð við rithøvundin, uttan so, at hesin er dulnevndur.*

*Tað ber nemliga til at verða dulnevndur, tó ikki fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðnum. Vit skulu altíð vita, hvør tað er sum skrivar.*

*Ráðið virkar sum ritstjórn, soleiðis at skilja, at vit tilskila okkum rætt til at lata verða við at geva ein blogg út, um hesin ikki lýkur krøvini fyri siðiligheit. Vit loyva tó øllum sjónarmiðum framat, so ein bloggur umboðar ikki neyðturviliga sjónarmiðini hjá Sjúkrarøktaretiska Ráðnum. Bloggurin skal verða millum 450 og 900 orð til longdar.*

*500,- kr. verða latnar fyri hvønn útgivna blogg. Í mesta lagi ein bloggur verður givin út um mánaðin.*

*Hevur tú okkurt upp á hjartað, skriva so til okkara á etikkur@sjukrarokt.fo*

# UMSORGAN Í MODERNAÐA HEILSUVERKINUM

☛ SKRIVAÐ HEVUR EIVY KRISTIANSEN

Herfyri vitjaði kendi norski sjúkrarøktarfrøðingurin og heimspekingurin, Kari Martinsen, í Føroyum, har hon helt fyrilestur við heitinum ”Tíðarakseleratión, resonansur og seinføri í røktarrúminum”. Martinsen hevur skrivað fleiri bøkur um umsorgan, relatión og sansaliga sjúkrarøkt, og hevur fingið íblástur frá eitt nú Knud Ejler Løgstrup.

Í fyrilestrinum hugleiddi Martinsen um týdningin av sansaligari sjúkrarøkt og umsorgan, og hvørja rúmd hetta fær í modernaða, akselereraða heilsuverkinum. Í heilsuverkinum síggja vit nevniliga eina vaksandi bureaukratisering og teknokratisering, har avgerðir alsamt meira verða tiknar út frá standardiseraðum mannagongdum, hagtølum og fíggjarligum atlitum, heldur enn individuellum menniskjaligum tørvum.

Martinsen leggur dent á týdningin av umsorgan og menniskjaligum relatiónum, og ávarar ímóti einum akselererandi heilsuverki, sum reduserar menniskju til objektir.

Ein onnur vís kvinna, heimsspekingurin Hannah Arendt, skrivaði somuleiðis um vandarnar við bureaukratiskum skipanum, sum stuðla einari instrumentellari tilgongd, har effektivitetur og produktivitetur gerast fremstu málini, meðan etisku atlitini mugu lúta.

Arendt legði dent á týdningin av pluraliteti, sum merkir, at hóast menniskju eru eins, so eru vit øll serstøk á okkara egna hátt, og tað er í viðurkenningini av hesum pluraliteti, at vit vísa hvørjum øðrum virðing. Hetta samsvarar væl við tankarnar hjá Martinsen, um týdningin av at viðurkenna, at hvør einstakur sjúklingur er eitt unikt individ og hevur eitt serstakt virði.

## ARENDT, ÓNDSKAPUR OG BUREAUKRATISERING

Í 1961 skrivaði Arendt um rættarmálið hjá Adolf Eichmann, fyri blaðið The New Yorker, og seinni gav hon út bókina Eichmann in Jerusalem – On the Banality of Evil (1963). Eichmann var SS-offiserur undir seinna heimsbardaga og var ein av arkitektunum handan Holocaust týningarleguna. Í bókini avbjóðar Arendt siðbundnu áskoðanina av óndskapi sum nakað djúpt illviljað ella demoniskt. Í staðin varpar hon ljós á, hvussu gerðirnar hjá Eichmann ikki neyðturviliga vóru drivnar av hatri ella einum serliga óndum vilja, men heldur av blindum lýdni móti boðum og manglandi førleika at hugsa kritiskt um sínar gerðir.

Fyri Arendt var Eichmann hvørki sadistur ella psykopatur. Hann var ein vanligur embætismaður, sum passaði sítt arbeiði og ikki setti spurnatekin við avleiðingarnar av sínum gerðum. Tað er í hesum sambandi, at Arendt mennir sína hugsan um ”the banality of evil”. Hon førir fram, at tað ónda ikki altíð vísir seg sum nakað stórt og dramatiskt, men ofta kann vera úrslit av vantandi hugsan, empati og morali.

Arendt var kritisk ímóti, hvussu bureaukrati kunnu redusera menniskju til bert at vera brikkar í eini størri skipan og soleiðis køva alla kritiska hugsan og etiska refleksjón. Vit kunnu samanbera hetta við eitt heilsuverk, har akselereraða fokusið á effektivitet og standardisering ger, at sjúklingurin verður reduseraður til eitt ”tal” ella eina ”uppgávu”, ístaðin fyri at síggja hann sum eitt serstakt individ, sum hevur tørv á røkt og uppmerksemi.

## UMSORGAN VS. EFFEKTIVITET

Arendt helt, at fokusið á effektivitet og produktivitet í tí modernaða samfelagnum kann

føra til eitt slag av moralskari líkasælu, har fólk ikki longur hugsa kritiskt um avleiðingarnar av sínum gerðum. Í einum heilsuverki, har effektiviteturin gerst fremsta fokusið, kann vandi vera fyri, at røktin av sjúklinginum gerst sekunder. Heilsustarvsfólk kunnu gerast so bundin av at náa nøkrum ávísum málum, t.d. at viðgera skjótt og spara tíð og pening, at tey ikki longur hava tíð ella orku at reflektera um týdningin av sínum arbeiði ella um menniskjaliga tørvin hjá sjúklinginum.

> **Í EINUM HEILSUVERKI, HAR EFFEKTIVITETURIN GERST FREMSTA FOKUSIÐ, KANN VANDI VERA FYRI, AT RØKTIN AV SJÚKLINGINUM GERST SEKUNDER.**

Eins og Eichmann ikki reflekteraði um sín leiklut í nazistisku skipanini, so eru heilsustarvsfólk í eini hyper-effektivari skipan í vanda fyri at missa sambandið við menniskjaligu dimensjónina í sínum arbeiði. Tey kunnu kenna seg sum smáar brikkar í eini størri skipan, har endamálið bert er at klára uppgávurnar skjótt og effektivt. Hetta kann elva til eina kenslu av, at moralska ábyrgdin fyri tí einstaka sjúklinginum verður tikin frá teimum og løgd í skipanina ístaðin.

Uttan rúm fyri refleksjón og empati, kann tað akselereraða heilsuverki elva til eitt slag av ”banalari vanrøkt”. Her røkja starvsfólkini sínar uppgávur, uttan nakað kritisk umhugsni um, hvat teirra gerðir hava at týða fyri einstaka sjúklingin ella hvussu tey kunnu tryggja ektaða røkt og umsorgan. Sum Arendt sigur, so er tað ikki neyðturviliga óndskapur í tilvitaðum og virknum formi, men heldur tankaloysi og vantandi refleksjón, sum kann hava oyðileggjandi avleiðingar.

## ARENDT OG MODERNAÐA HEILSUVERKIÐ

Hóast Arendt skrivaði um politiska heimspeki og totalitarismu, so kunnu hennara tankar eisini brúkast til at reflektera um effektivitet og menniskjalig atlit í tí modernaða heilsuverkinum. Í einum akselererandi heilsuverki er umráðandi at seta spurnatekin við, hvussu vit kunnu varðveita tíð og rúmd til refleksjón og etiskt umhugsni.

Tankarnir hjá Arendt og Martinsen leggja upp til spurningar sum, hvussu tryggja vit, at heilsustarvsfólk hava tíð og møguleika at reflektera um sínar gerðir og sambandið við sjúklingin, ístaðin fyri bert at fokusera uppá skjóta og effektiva viðgerð? Hvørjar avleiðingar hevur ein yvirdrivin raðfesting av effektiviteti og hagtølum fyri góðskuna av røktini, sum sjúklingarnir fáa? Og hvussu sleppa vit undan, at heilsustarvsfólk gerast ”bureaukratar” í eini skipan, sum tekur menniskjaliga elementið úr teirra arbeiði?

Arendt vildi kanska sagt, at tað krevur, at vit støðugt reflektera og standa ímóti tí slagnum av tankaloysi, sum kann stinga seg upp í einum yvirbureaukratiseraðum heilsuverki. Um vit gera hetta, kann tað møguliga hava við sær, at størri dentur verður lagdur á **empati, kritiskan hugsan og moralska ábyrgd.**

# SAMVITSKUPARAGRAFFIN Í LÓGARUPPSKOTINUM UM FOSTURTØKU

Tíðliga í ár var lógaruppskot um nýggja fosturtøkulóg løgd fram fyri Løgtingið. Lógaruppskotið var í stóran mun líka sum danska lógin, tó við undantøku av, at sonevnda "samvitskuparagraffini" ikki var við. Hetta vóru summi ónøgd við, meðan onnur hildu tað verða jaligt.

SER tók sum so ikki støðu í málinum, men royndi heldur at birta undir eitt upplýsandi og siðiligt kjak um evni, og annars at upplýsa málið som væl sum gjørligt, við grundgevingum fyri og ímóti. Tað gjørdu vit við tveimum lesarabrøvum.

☛ **FYRRA LESARABRÆVIÐ LJÓÐAÐI SOLEIÐIS:**

## ÁSETING Í LÓGINA UM UNDANTØKU FYRI HEILSUTARVSFÓLK TIL AT FREMJA ELLA LUTTAKA Í FOSTURTØKU?

Eitt grundleggjandi virði undir sjúkrarøktini er, at sjúkrarøktarfrøðingurin vísir umsorgan fyri øllum sum líða, uttan mun til orsøk til líðingina

Í samband við kjakið um sonevndu samvitskugreinina, sum hevur tikið seg upp seinastu dagarnar, vilja vit í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum geva okkara íkast til orðaskifti, sum vit vóna verður bæði sakligt og upplýsandi.

Hendan serliga ásetingin í donsku fosturtøkulógini, sum sleppur heilsustarvsfólki undan at fremja ella luttaka í fosturtøku, er ikki tikin við í føroyska lógaruppskotið, tó at uppskotið stórt sæð er ein umseting av donsku lógini.

Bjarni Kárason Petersen, Landsstýrismaður í Lógarmálum, sum eigur lógaruppskotið sigur, at henda ásetingin varð vald frá av ótta fyri, at tað ikki fer at bera til at fremja fosturtøku í Føroyum, um fleiri fara at bera seg undan.

Føroyar er eitt smásamfelag og tí er talið av serlæknum í kvinnusjúkum nógv lægri her enn í Danmark, sum aftur hevur við sær, at málið um samvitskugreinina er meira viðbrekið her hjá okkum av praktiskum orsøkum.

Her eru ikki líka nógvir serlæknar at taka av. Diana Reynstind, serlækni í kvinnusjúkum heldur tó ikki, at hesin vandin er so veruligur, tí ert tú

útbúgvin serlækni í kvinnusjúkum, so hevur tú framt fosturtøkur og tú sær hetta sum ein part av tínum arbeiði.

Hon er tó stúrin um signalvirði sum er í, at tað ber heilsustarvsfólki til at velja ein bólk frá, sum hevur tørv á hjálp frá heilsuverkinum. Bjarni Kárason Petersen sigur tó eisini, at hann hevur fingið at vita frá Sjúkrahúsverkinum, at tey ikki meta hesa serligu ásetingina í lógini verða ein trupulleika fyri at kunna hava tilboðið um fosturtøku óskert, tí tað ber til at finna loysnir, um ein slík støða skuldi komið í.

Tey sum skulu arbeiða undir lógini meta eftir hesum at døma ikki, at samvitskugreinin er ein trupulleiki av praktisku orsøkunum, sum landstýrismaðurin sá fyri sær. Men tað kunnu verða ein ørgrynna av øðrum, bæði praktiskum og etiskum spurningum, sum stinga seg upp, tá spurt verður, um ásetingin um at sleppa heilsustarvsfólki undan at fremja ella luttaka í fosturtøku eigur at verða partur av lógini um fosturtøku.

Orðaskiftið um fosturtøku snýr seg aloftast um, hvørt atlit skal takast til avgerðarrættin hjá kvinnuni til at ráða yvir egnum kroppi á aðrari síðuni, og rættin til lív hjá fostrinum á hinari síðuni.

Samvitskugreinin snýr seg tó hvørki um fostur ella kvinnu, men um atlit til heilsustarvsfólk og samvitsku teirra í samband við at fremja fosturtøku. Tá vit soleiðis hava eitt orðaskifti um, hvørt vit skulu hava hesa serligu ásetingina við í lógaruppskotið, verður spurnatekin sett við, um atlit eigur at verða tikið til heilsustarvsfólk ella ikki. Við verðandi uppskoti tykist áskoðanin á heilsustarvsfólk verða, at hesi fyrst og fremst hava plikt til at hjálpa kvinnuni, sum søkir sær hjálp til at fremja fosturtøku, á sama hátt sum tey hava plikt til at hjálpa øllum øðrum, sum leita sær hjálp frá heilsuverkinum.

Hetta siga vit út frá tí sannroynd, at samvitskugreinin er strikað, ella rættari, er ongantíð komin við í verðandi lógaruppskot.

Vit halda tó, at heilsustarvsfólk eiga at hava møguleika fyri at verða fatað sum fólk, ið koma í samband við bæði eina kvinnu og eitt fostur.

Um heilsustarvsfólk fatar fostrið, sum annaðhvørt at hava menniskjavirði frá giting ella fær størri og størri etiskan status, eftirhondini sum tað veksur til í móðurlívið, kann tað, at noyðast at fremja ella hjálpa til við at fremja fosturtøku, føra til svára sálarkvøl, sum danska lóggávuvaldið heldur, at hesi eiga at kunna sleppast undan.

Í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum halda vit, at atliti til heilsustarvsfólk í øllum førum eigur at verða tikið við í ***orðaskiftið*** um hetta viðbrekna og etiskt ógvuliga trupla mál, sum fosturtøka er.

Tað eru uttan iva ein ørgrynna av praktiskum og etiskum spurningum, sum knýta seg at spurninginum um undantøkuáseting í komandi fosturtøkulóg. Vit halda tað tí vera ógvuliga týdningarmikið, at vit í Føroyum hava eitt orðaskifti um hesi viðurskifti, soleiðis at ein undantøkuáseting - ella manglandi undantøkuáseting - í lógini, verður lýst og grundgivin fyri væl og virðiliga, heldur enn at verða tagd burtur.

Ein av spurningunum, sum stinga seg upp í samband við undantøkuásetingina er, hvønn undantøkuásetingin rakar. Tað tykist verða greitt, at tað eru serlæknar í kvinnusjúkum, sum fremja fosturtøkur, men hvørji heilsustarvsfólk luttaka?

Ein annar týðandi spurningur, sum tað longu nú verður kjakast dúgliga um á sosialu miðlunum, er, hvussu langt ella vítt undantøkuásetingin skal røkka. Er tað t.d. at rokna sum at luttaka í fosturtøku, at røkta kvinnuna, tá fosturtøkan er framd og henni tørvar røkt og viðgerð aftaná?

Tá tað kemur til hesar og aðrar spurningar, tykist grundarlagið undir orðaskiftinum at vera rættiliga gruggut og vónandi fer orðaskifti at upplýsa hesi ivamál.

Hóast tað kanska kann tykjast sum at loypa eitt stig um, vilja vit allíkavæl fegin byrja orðaskifti við at argumentera fyri eini avmarking av undantøkugreinini, heldur enn at taka støðu til, um hon skal við ella ikki.

Tað gera vit við støði í tí sum Diana Reynstind vísir til í grein í Dimmalætting nú um dagarnar, og kanska serliga kjakið sum tók seg upp aftaná, har tað tóktist greitt, at fólk tosaðu út frá ymiskum fortreytum fyri avmarkingum av undantøkuásetingini.

## UMSORGAN FYRI ØLLUM SUM LÍÐA, UTTAN MUN TIL ORSØK TIL LÍÐINGINA

Eitt grundleggjandi virði undir sjúkrarøktini er, at sjúkrarøktarfrøðingurin vísir umsorgan fyri øllum sum líða, uttan mun til orsøk til líðingina. Hetta er eisini fyrsta reglan í Yrkisetisku leiðreglunum fyri sjúkrarøktarfrøðingar.

Tá Diana Reynstind vísir á, at tað eru onkur heilsustarvsfólk, sum ikki vilja inn til hesar kvinnurnar, hóast tær hava tørv á pínulinnan ella bløða og hava tørv á røkt í tí sambandi, so samsvarar tað ikki við virðini hjá sjúkrarøktarfrøðingum.

Vit meta tí ikki, at røkt av kvinnu aftaná fosturtøku kann skúgvast inn undir ásetingina um undantøku av samvitskuorsøkum.

Vit vóna veruliga, at vit sum samfelag megna at fáa eitt virðiligt, siðiligt og upplýsandi orðaskifti um hesi viðurskifti, so tað ber til at fáa eyga á teir mongu partarnar av málinum, sum enn eru duld fyri flestu okkara.

Tá avgerðin at enda verður tikin um, hvørt undantøkuásetingin skal verða við í lógaruppskotinum ella ikki, og hvørjar avmarkingarnar skulu galda, verður tá vónandi lættari at hvíla í, at tær betru og sterkastu grundgevingarnar áttu munin.

Við virðing
***Sjúkrarøktaretiska Ráðið***

Í samband við tað lesarabrævið, var forkvinnan í útvarpstíðindunum, og tað ljóðbrotið kann hoyrast annaðhvørt við at fara inn á heimasíðuna hjá KVF og finna kl. 18 tíðindini hin 20. apríl ella við at fylgja leinkjuni her

☛ TAÐ SEINNA LESARABRÆVIÐ LJÓÐAÐI SOLEIÐIS:

# FYRI OG Í MÓTI UNDANTØKUÁSETING Í FOSTURTØKULÓGINA

Í samband við uppskotið um nýggja fosturtøkulóg, hevur kjak tikið seg upp fyri og í móti eini undantøkuáseting í lógini. Ásetingin skal loyva heilsustarvsfólki at nokta at fremja ella luttaka í fosturtøku vegna trúarligar ella moralskar sannføringar. Summi halda tað verða sjálvsagt og ein menniskjarættur, meðan onnur halda ikki tað kann verða rætt, at heilsustarvsfólk skulu sleppa at velja ávísar viðgerðir frá. Sum í sjálvum fosturtøkuspurninginum, er fráfaringarstøði fyri hesar báðar hugburðir fullkomiliga hvør sítt.

Í kjalarvørrinum av hesum kjakinum, vilja vit í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum gera eina roynd at lýsa grundgevingar fyri og ímóti hesi áseting.

Skrivið skal á ongan hátt fatast sum ein fullfíggjaður listi av grundgevingum, men heldur ein roynd hjá okkum at geva okkara íkast til at lýsa ein part av knortluta landslagnum hesum viðvíkjandi. Meiningarnar eru nógvar í almenna rúminum, men grundgevingarnar fylgja ikki altíð við. Tí hava vit leita okkum fram nakrar av teimum mest kendu grundgevingunum fyri og í móti undantøkuásetingini. Hesar kunnu sjálvandi dýpast nógv meira, enn tann tekstur, vit velja at skriva her, men kann allíkavæl vónandi virka sum eitt lítið yvirlit við essensinum av viðkomandi grundgevingum.

Ein undantøkuáseting virðir rættin hjá heilsustarvsfólki til at virka samsvarandi persónligar sannføringar og samvitsku. Við ásetingini fylgir ein viðurkenning av, at heilsustarvsfólk kunnu hava etiskar ella trúarsannføringar, sum gera tað trupult ella ógjørligt hjá teimum at fremja ella luttaka í fosturtøku. Undantøkuásetingin er soleiðis í veruleikanum ein roynd at taka atlit til so nógv sum gjørligt í trupla málinum um fosturtøku. Um fosturtøkulógin varð skrúvað saman soleiðis, at hon tekur fult undir við teimum, sum eru fyri fosturtøku, ella fult undir við teimum, sum eru ímóti, var ikki neyðugt við eini áseting. Í fyrra førinum, tí um tað er greitt, at talan "bara" er um eitt heilsutilboð sum øll onnur, er samvitskubit fullkomiliga burturvið og ásetingin tí óneyðug. Í seinna førinum er hon óneyðug, tí tá vildi man ikki komi í støðuna, eftirsum ongin fosturtøka vildi verið framd.

Tað skerst tó ikki burtur, at sjálvt tað at seta eina slíka áseting í lógina, í sjálvum sær er ikki so líka til. Niðanfyri er ein stutt frágreiðing um nakrar av teimum mest týðandi grundgevingunum í samband við undantøkuásetingina.

## GRUNDGEVINGAR FYRI UNDANTØKUÁSETING:

### 1. PLIKT TIL AT VIRKA SAMSVARANDI EGNU SANNFØRINGAR:

Heilsustarvsfólk hava eina moralska plikt til at virka samsvarandi egnari samvitsku og sannføring. At noyða heilsustarvsfólk til at útinna ella luttaka í fosturtøku, sum tey eru fullkomiliga ósamd í, kann føra til moralska strongd.

### 2. YRKISAUTONOMI OG -INTEGRITETUR:

Um heilsustarvsfólk ikki hava møguleika fyri at taka avgerðir, sum samsvara við teirra trúarsannføring ella etisk virðir, ger man seg inn á teirra sjálvsavgerðarrætt. Undantøkuásetingin kann harafturat styrkja teirra yrkisintegritet, sum aftur hevur við sær, at tey kenna seg at verða vird

og stuðlað í sínum yrki. Hetta er við til at tryggja, at tey kunnu varðveita sína sálarligu og moralsku vælferð og vælveru.

### 3. PRINSIPPIÐ UM AUTONOMI:

Virðingin fyri persónligari autonomi vísir til virði at viðurkenna og virða rættin hjá einstaklingum til at taka avgerðir um sítt egna lív og handlingar, grundað á egin virðir, sannføringar og ynski. Heilsustarvsfólk eru fakfólk við egnum persónligum virðum, moralskum sannføringum og etiskum leiðreglum. Hesi kunnu fevna um trúarligar, mentanarligar ella persónligar sannføringar, sum kunnu ávirka teirra hugburð til fosturtøku.

### 4. VIRÐING FYRI PLURALISMU OG YMISLEIKA:

Virðing fyri pluralismu og ymisleika í samfelagnum er týdningarmikil. Heilsustarvsfólk kunnu hava ymiskar mentanarligar, trúarligar og moralskar grundfatanir, sum ávirka teirra áskoðan á fosturtøku. Virðing fyri og atlit til hetta margfeldi er týdningarmikið fyri at varðveita eitt rættvíst og inkluderandi samfelag.

### 5. JAVNVÁG MILLUM RÆTTINDI:

Undantøkuásetingin kann geva eina javnvág millum rættindini hjá heilsustarvsfólki og hjá kvinnuni, sum skal hava framt fosturtøku. Við at geva heilsustarvsfólki møguleika fyri at søkja um undantøku av samvitskuorsøkum, verður tryggjað, at tey ikki verða noydd til at virka ímóti persónligum sannføringum, samstundis sum at kvinnurnar fáa atgongd til neyðugar heilsutænastur í samband við fosturtøku.

Hetta seinasta eru tað tó nøkur, sum halda kann verða trupult í einum lítlum samfelagi sum okkara, tí hópurin at taka av, er ikki so stórur. Í álitinum frá Rættarnevndini førir ein av trimum minnilutabólkum tó fram, at tá fosturtøka er eitt heilsutilboð á jøvnum fóti við onnur heilsutilboð, skal heilsuverkið altíð tryggja, at neyðuga tilfeingið er til staðar.

## GRUNDGEVINGAR ÍMÓTI UNDANTØKUÁSETING:

### 1. RÆTTURIN TIL HEILSUTILBOÐ:

Ein grundgeving í móti undantøkuásetingini er, at hon kann máa støði undan rættinum hjá kvinnum til at fáa eina trygga fosturtøku. Allir borgarar hava rætt til at fáa tað heilsurøkt, sum teimum tørvar, og undantøkuásetingin kann seta óneyðugar forðingar hjá kvinnum til lógligar heilsutænastur.

### 2. MØGULIG DISKRIMINATIÓN OG ÓJAVNI:

Tá heilsustarvsfólk nokta at útinna ella luttaka við fosturtøku, diskriminerar tað ein ávísan sjúklingabólk. Javnbjóðis atgongd til øll heilsutilboð er eitt berandi samfelagsvirði, og tí er tað at gera seg inn á hetta týdningarmikla virði, at nokta at hjálpa einum ávísum bólki av fólki, sum søkja sær lógliga hjálp frá heilsuverkinum.

### 3.YRKISLIG ÁBYRGD OG PLIKT:

Heilsustarvsfólk eru pliktað til at veita neyðugu viðgerðina, sum fólk leita sær hjálp fyri, óansæð persónligar sannføringar. Við at nokta at útinna ella at luttaka við fosturtøku, vanrøkja heilsustarvsfólk sína professionellu ábyrgd og plikt til at virka til gagns fyri sjúklingin, umframt at leggja til eina ójavna atgongd til heilsuverkið.

### 4. YRKISLIGUR INTEGRITETUR OG ÓHEFTNI:

Heilsustarvsfólk eiga at varðveita ein ávísan neutraliteti og objektiviteti í sínum virki og eiga at lata verða við at lata persónligar sannføringar ávirka teirra professionella virki. Undantøkuásetingin kann máa støði undan professionella integritetinum, við at loyva heilsustarvsfólki at nokta at útinna ella luttaka við fosturtøku, grundað á persónligar sannføringar.

**5. MØGULIG MISNÝTSLA:**
Summi eru bangin fyri, at tað er trupult at halda undantøkuásetingina, til bara at fevna um fosturtøkur, men at grundgevingar fyri ásetingina kunnu misbrúkast til eisini at fevna um aðrar sjúklingar ella sjúklingabólkar, t.d. sjúklingar, sum sambært sannføringum hjá starvsfólki, hava ein ómoralskan levnað.

Grundstøði undir grundgevingunum eru sostatt púra hvør sínar. Grundgevingarnar fyri undantøkuásetingini leggja dent á at virða samvitsku og autonomi hjá heilsustarvsfólki, meðan argumentini ímóti undantøkuásetingini leggja dent á at tryggja javnbjóðis atgongd til heilsutilboð og professionellan neutralitet.

At fáa eitt upplýst orðaskifti er týdningarmikið fyri at tryggja, at avgerðir, sum verða tiknar, eru væl grundaðar og virða bæði rættindi og etisku fyrilitini hjá øllum pørtum. Vit vóna, at hendan frágreiðing kann geva eitt yvirlit yvir hesi ymisku sjónarmið og stuðla upp undir eitt siðiligt kjak, eisini aftaná, at avgerðin er tikin.

# RÚM TIL REFLEKSJÓN

Eitt sum vit allatíðina hugsa um, er týdningurin av refleksjónsrúmd í sjúkrarøktini og hvussu SER kann verða ein stuðul til, at rúmdin verður givin. Í ár hava vit tí sett etikk-kveikjaranet á stovn umframt at arbeiða við talgildari refleksjón.

# ETIKK-KVEIKJARA NET

Við íblástri frá skipanini við álitisumboðum, settu vit okkum fyri, at royna at skapa eitt netverk við etikk-kveikjarum við tí endamálið, at skapa karmar fyri, at tryggja skipaða refleksjón á øllum arbeiðsplássum, har sjúkrarøktarfrøðingar starvast.

# SAMSTARV VIÐ FÁ6

Av tí at leiðararnir eru ein ógvuliga týðandi súla undir einum slíkum neti, og tí at hugskotið bara kann bera frukt, um leiðslan tekur undir við tí, avgjørdu vit at fara í samstarv við Fá6, sum er áhugabólkurin fyri leiðarar undir Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar. Av tí at vit longu høvdu eina avtalu við Dorthe Birkmose um at hava temadag í september, avgjørdu vit at hava eina verkstovu fyri leiðarar hin 9. september.

Endamálið var at presentera etikk- kveikjara uppskotið. Fyrrapartin vóru vit saman við Dorthe Birkmose, sum helt fyrilestur undir heitinum **"Løsninger, der gør forråelse unødvendig"**.

Seinnapartin brúktu vit at tosa um og arbeiða eitt sindur víðari við uppskotinum um etikk-kveikjarar.

Tað eru fleiri orsøkir til, at uppskotið arbeiddi seg fram júst nú:

### 1. ØKTUR EFTIRSPURNINGUR EFTIR AT FÁA SER ÚT Á EINDIRNAR

Fleiri fyrispurningar hava verið seinasta árið, um at fáa SER út á tey ymisku arbeiðisplássini, til at hjálpa til við etiskum refleksjónum ella bara at leggja fólki lag á. Avmarka menniskjaligt tilfeingi ger, at tað ikki ber okkum til. Arbeiði í SER er sjálvboðið og allir limir hava fult arbeiði við síðuna av.

### 2. ØKT JÁTTAN

Tað, at játtanin varð økt til 80.000 kr. pr. 1. januar 2024 ger, at vit hava eitt nógv størri fíggjarligt rásarúm, sum vit fegin vilja kemur limunum til góðar.

Hesar báðar fortreytir vóru spírin til hugskotið. Harafturat kemur, at refleksjónsrúmið hevur trong kor í dagsins samfelag, samstundis sum at tað er ein so grundleggjandi súla undir okkara yrkismenning.

Omanfyri 40 leiðarar luttóku í verkstovuni og hesir tóku væl undir við uppskotinum. Nógvir ymiskir snøklar og nærri nágreiningar skulu gerast fyri hvørt arbeiðisplássi sær, sum jú øll hava ymiskar fortreytir, bæði av skipanarligum og øðum slagi. Hetta er ein byrjan, og vit mugu víðari menna í felag.

SER takkar Fá6 fyri gott samstarv.

# FYRSTA VERKSTOVAN VIÐ ETIKK- KVEIKJARUM

Fyrsta verkstovan við etikk-kveikjarum saman við leiðarum, var fyrrapartin hin 13. november. Umleið 60 fólk luttóku úr øllum landinum og tað var so sera hugaligt at merkja, hvussu eldhugað og virkisfýsin hesi fólkini eru.

Fyrst á skrá var frágreiðing um uppskotið og síðan hevði Marja Lund Gjógvará eina framløga um refleksjón. Hon tók støði í ástøði um "Tey Trý H´ini" , sum er ein eitt sindur simplari tilgongd, enn refleksjónsfaldarin hjá Sjúkrarøktaretiska Ráðnum, sum er meira umfatandi. Í eini skjótari vending, eru tey trý H´ini lættari at fara til. Skal man í dýpdina við etikkini, er Refleksónsfaldarin tó hin betri. Har afturat gjøgnumgekk Marja refleksjónsfrymilin hjá Graham Gibbs.

Aftaná verkstovuna, gjørdi SER ein pilotfaldara út frá framløguni hjá Marju, sum etikk-kveikjararnir royna av til næstu verkstovu. Út frá innkomnu viðmerkingum, kann faldarin tillagast, og at enda prentast professionelt, til allar sjúkrarøktar-frøðingar at brúka.

Síðan arbeiddu leiðararnir og Etikk-kveikjarar-nir hvør sær í bólkum. Leiðararnir arbeiddu við spurninginum *"Hvussu kann SER best stuðla tær í arbeiðnum við at halda fast um skipaða refleksjón"* meðan etikk-kveikjararnir fingu spurningin *"Hvussu dugna vit í SER teg best til uppgávuna?"*. Uppskotini vóru savnað á post-it seðlar og vit endaðu við at fara í dýpdina við nøkur uppskot. Hesi uppskotini fer SER at brúka sum hugskots-banka til framtíðar verkstovur.

Næsta verkstovan verður hin 24 februar á Báta-felagnum á Bakka á Glyvrum.



# TALGILD REFLEKSJÓN

Við íblástri úr Noregi, arbeiðir SER við at verkseta talgilda refleksjón. Norska skjalið er umsett og er síðan pilottestað ymsastaðni, og broytingar gjørdar samsvarandi afturmeldingum. Vit vænta, at hetta er klárt nakað tíðliga í komandi árið.

Kunnað verður um talgildu refleksjónina á heimasíðu felagsins sjukrarokt.fo., umframt á sosialu pallunum hjá SER, tá klárt er at fara í gongd.

Her ber til at lesa um norska tiltakið .

# TEMADAGUR VIÐ DORTHE BIRKMOSE SAMAN VIÐ FPS

Eitt tiltak, sum vit saman við áhugabólkinum FPS (Føroyskir Psykiatriskir Sjúkrarøktarfrøðingar) so smátt vóru byrjað at fyrireika longu í 2023, var temadagurin við Dorthe Birkmose.

Temadagurin, sum bar heiti “Fimm fet frá ráan”, var hildin á Hotel Hilton hin 13. september í ár. Tiltakið var alment og um 120 fólk frá øllum vælferðargeiranum luttóku.

Dorthe Birkmose er ein framúrskarandi góður miðlari. Hon dugir ótrúliga væl at dosera sín boðskap við einum kryddi av sunnum humori, sum ger, at vit, sum hava lyndi til at skamma okkum, tí vit kenna okkum aftur í tí sum sagt verður, klára betri at verða í teim truplu kenslunum. Soleiðis fáa vit møguleika fyri at verða í, at virðir og atferð okkara ikki altíð fylgjast, sum er ein neyðug sannkenning, skulu vit læra av tí. Tann læringin er ein fortreyt fyri at fyribyrgja ráan, sum var tað hon var komin higar at tosa um. Við einum tussjpenni og tussjtalvu, har hon skrivaði nakrar heilt fáar setningar, rúnabant hon áhoyrararnar í ein heilan dag.

Fyrsta fetið burtur frá ráanini er ein sannkenning av vandanum fyri ráan. Næsta fetið er at gerast varur við tey mongu ávaringarteknini, sum



síggjast í praksis. Triðja fetið er at menna neyðuga psykologiska tryggleikan, so ávaringarteknini sleppa fram í ljósmála, uttan at nakar verður skammaður. Fjórða fetið er at skilja psykiska slitið, sum hópast upp, soleiðis at fimta fetið endiliga kann takast, sum er at loysa teir trupulleikar, sum hava gjørt ráanina neyðuga.

Hon byrjaði dagin við at siga nakað um "Knaphedens psykologi" sum tit kunnu síggja hana greiða frá í stuttum her.

Í gjøgnum dagin dýpti Dorthe Birkmose tey fimm fetini og hóast hon ikki lovaði, at tað er lætt, vísti hon á, at tað ber til at sleppa undan ráanini. Millum mangt annað, gjørdi hon fitt burturúr at vísa á munin á moralskari strongd og umsorganarmøði, sum krevja hvør sínar loysnir.

Ein týðandi partur av fyribyrgingini, er at vit øll átaka okkum ábyrgdina fyri at mótmæla tá vit síggja onkran gera okkurt, sum bendir á psykiskt slit, sum t.d. at fara illa ella óvirðiligt við fólki, ella tosa niðursetandi um onnur. Hon vísti tó eisini á týdningin á psykologiskum tryggleika, fyri at tað skal bera til.

"Mennesket er mere socialt end det er moralsk", sum hon segði, so tí krevur tað nógv av einstaklinginum at siga frá í ein ráari mentan. Tað er ikki vist tað er so, men kenslan hjá tí einstaka starvsfólkinum kann verða, at "annaðhvørt má eg lata sum onki og verða partur av felagsskapinum ella má eg siga frá og risikera at verða útstoytt/ur". Eitt annað amboð, sum Dorthe Birkmose vísti á, er Perspektivskifti sum metoda, sum tað ber til at hoyra meira um í hesum fyrilestrinum.

Dagurin var ógvuliga "ríkur" og evnini røkka ikki, til at taka samanum á ein hátt, sum gevur innihaldinum nær námind tað viðurkenning og pondus tað hevur uppiborið. Hon hevði so ómetaliga nógv og ymiskt at greiða frá og í hesum tekstabrotinum er bara ein lítil brotpartur, sum á ongan hátt megnar at fanga øll tey mongu gullkornini, hon lat frá sær gjøgnum dagin.

Vit í SER vilja takka nevndini í FPS so hjartaliga fyri gott samstarv.

# NORÐURLENDSKT SAMSTARV

Í døgunum frá 16. – 18. september vóru Marjun Thomsen og Jana Mortensen umboð fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðið á árligu Norðurlendsku Sjúkrarøktaretikk ráðstevnuni, sum hesuferð varð hildin beint uttanfyri Oslo í Noregi.

## YVIRSKRIFTIN HESUFERÐ VAR "SYKEPLEIEETIKKEN NÅR KATASTROFEN RAMMER"

Har bleiv greitt frá, hvussu vanlukkur kunnu taka seg upp á fleiri stigum. Talan er bæði um stórar vanlukkur í samfelagnum, so sum álopið í Oslo og á Utøya í Noregi, men eisini um vanlukkur hjá einstaklingum, so sum álvarslig sjúka.

Sjúkrarøktarfrøðingar eiga ein týdningarmiklan leiklut, tá vanlukkur raka – bæði í samfelagnum og hjá tí einstaka. At vanlukkur á tann hátt eisini kunnu raka sjúkrarøktarfrøðingar sjálvar, var eitt evni, ið bleiv tikið fram og kjakast um á fundinum.

### TÁ VANLUKKAN RAKAR

Tá vanlukkan rakar, ávirkar tað bæði sjúklingin, avvarðandi, tey eftirsitandi, eygnavitni og tey professionellu, sum skulu hjálpa. Hvussu kunnu fólk liva víðari eftir vanlukkuna? Her kemur bæði vónin um framtíðina og uggin í støðuni í miðdepilin. Eitt foreldur, sum misti dóttrina á Utøya, segði soleiðis: *"Hann tók dóttur okkara, men hann sleppur ikki oyðileggja familjuna."*

At yvirliva eina vanlukku, kann vekja nógvar ymiskar kenslur, sum eru í andsøgn við hvørja aðra. Tey sum yvirliva ynskja á ein hátt, at onkur spyr tey um vanlukkuna, men tað kann samstundis føra við sær retraumatisering. Tí kann tað vera torført hjá teimum professionellu at finna útav, nær tað er rætt at spyrja – og nær tað ikki er.

Óvissan fyllir nógv hjá teimum, sum hava verið partur av eini vanlukku. Nøkur teirra, sum ikki kundu hjálpa av ymiskum orsøkum, hava kent seg sum offur og upplivað eina kenslu av ikki at hava strekt til. Pål Kristensen, psykologur og professari á Center for Krisepsykologi, Universitetet í Bergen, hevur kannað lívið hjá teimum sum eftir sita aftaná Utøya. Hann heldur, at trý ting eyðkenna tað at vera partur av eini vanlukku: kompetansusorg, sálarlig líðing orsakað av missi, og likamlig líðing. Nøkur enda við at umhugsa sjálvmorð, tí tað er so pínufult.

Fyri tey áhugaðu, ber til at lesa meira her og her.

### SJÚKRARØKTARFRØÐINGAR HAVA EIN TÝDNINGARMIKLAN LEIKLUT

Á fundinum gjørdist tað týðiligt, hvussu týdningarmiklan leiklut sjúkrarøktarfrøðingar hava. Serliga varð dentur lagdur á, at øll hava tørv á lívbjargandi viðgerð, men uttan samband og

relatión er tað eitt fátæksligt tilboð. Hetta varð m.a. orðað soleiðis:

> ”Hvat eru 20 sjúkrabilar verdir, um tað bert verður hugt eftir blóðrenslinum?”

Tann menniskjaliga relatiónin er á henda hátt avgerandi og ein partur av lívbjargandi viðgerðini.

Eitt annað týðandi evni viðvíkjandi leiklutinum hjá sjúkrarøktarfrøðingum er, at andsagnir eisini kunnu stinga seg upp her. Ein sum yvirlivdi Utøya, er Ida Spjelkavik, sum í dag er aðalsamskiftisleiðari í Norsk Sykepleierforbund. Tá ið hon var 25 ára gomul, starvaðist hon sum altjóða ráðgevi hjá AUF (Arbeidernes Ungdomsfylking). Hon var til arbeiðis á summarleguni hjá AUF á Utøya, tá yvirgangsálopið hendi 22. juli 2011. Hon greiddi hjartanemandi frá síni uppliving og segði m.a., at tað var ikki fyrr enn at ein sjúkrarøktarfrøðingur legði seg upp í songina hjá henni, at hon so at siga raknaði við. Her var tað heilt rætt at fara út um tað, sum vanliga verður hildið vera reinføris- ella privatmark, men skal síggjast í ljósinum av, at tað ikki er rætt í øllum støðum.

Søgan hjá Idu kann hoyrast á heimasíðuni hjá 22. juli-senteret.

### HVØR TEKUR SÆR AV SJÚKRARØKTARFRØÐINGINUM?

Tað er torført at siga, hvat krevst fyri at røkja og ansa sjúklingum, sum hava verið fyri eini vanlukku. Hóast uppgávan hjá sjúkrarøktarfrøðingum er at vísa menniskjaliga umsorgan, handla bráðfeingis og røkja við nærlagni, kann tað vera trupult at meta um, hvat er tað rætta í slíkum støðum. Hetta krevur faklig metanarevni, intuitión og rúm fyri at avgera, hvat er tann rætta sjúkrarøktin í hvørjari einstøku støðu.

Eitt sitat frá fyrilestrarhaldaranum Audun Mo er eitt gott fráfaringarstøði:

> ”At tora at brúka seg sjálvan í møtinum við sjúklingin – og tað er nokk.”

Audun Mo, sum er sjúkrarøktarfrøðingur, rithøvundur og limur í norska SER, misti konu sína í eini ferðsluvanlukku fyri nøkrum árum síðan. Til ber at lesa meira um Audun Mo á heimasíðu hansara: https://audunmo.com/

Eitt annað spurningur sum stingur seg upp í sambandi við leiklutin hjá sjúkrarøktarfrøðinginum er, hvussu nógv hann eigur at seta seg sjálvan í váða, tá vanlukkan rakar – hvar gongur markið millum at geva av sær sjálvum og á hin bógvin at seta seg sjálvan og sína familju í vanda? Tað snýr seg um raðfestingar og um at megna støðugt at hugsa greitt, eitt ið kann samanberast við at vera í einum krígsraktum øki…

Øll londini kendu seg aftur í, at undirmeta ta kensluligu byrðuna, sum heilsustarvsfólk standa í. Samlaða arbeiðsbyrðan økist í tyngd, tá vit fara frá einum sjúklingi til annan, uttan at fáa nóg mikið av tíð til etiska umhugsan og sálarligan stuðul. Um vit halda fram við at undirmeta ta kensluligu byrðuna, ið heilsustarvsfólk uppliva, bæði í einstøkum støðum og yvir longri tíð, kann tað møguliga føra til, at sjúkrarøktarfrøðingar fara úr fakinum og at færri koma til.

### ETISKAR TVÍSTØÐUR Í MIÐDEPLINUM

Við støði í evninum “Sjúkrarøktaretikkur, tá vanlukkan rakar”, brúktu vit rúma tíð at kjakast um m.a. umsorganarmøði og moralska strongd, og hvussu sjúkrarøktaretisku ráðini kunnu seta fokus á fyribyrging. Amboðini til fyribyrging finnast longu, so sum starvsfelagastuðul og etisk og faklig umhugsan. Spurningurin er, hvussu vit kunnu

tryggja rúmd fyri hesum. Hetta er eitt spurningur, sum SER allatíðina arbeiðir við og roynir at funna ymisk boð uppá.

### VITJAN Á UTØYA

Seinnapartin hin 17, vitjaðu vit Utøya. Tað var ein ógvuliga kensluborin vitjan, sum hevur sett síni spor. Beint aftaná, at vit komu heim úr Noregi, hugleiddi Marjun Thomsen millum annað nakað soleiðis um vitjanina:

“Eri júst komin heim til Føroya í dag. Hetta hava verið nakrir ómetaliga hjartanemandi dagar. Eisini vitjaðu vit á Utøya, har ein ungur etniskur norðmaður skeyt og drap hópin av ungdómi, ið var á summarlegu í oynni. Hetta var tann 22. juli í 2011.

Ein ungur maður tók ímóti okkum, greiddi okkum frá og førdi okkum runt á oynni. Sera áhugaverdar frásagnir, bæði í gaman og sorgfullum álvara, sum av álvara kendist heilt inn í innastu sálina hjá okkum ið lurtaðu, eygleiddu og spákaðu kring oynna.

Tann fyrsta myndin er av einum húsum og tveimum smáttum. Millum smátturnar varð illgerðamaðurin handtikin. Í húsinum beint við smátturnar høvdu heilsu- starvsfólk barrikaderað seg saman við 15 ungum menniskjum. Í avhoyringunum greiddi illgerðarmaðurin frá, at hann hevði sæð, at fólk krógvaðu seg har inni, og at hann hevði ætlað sær at seta eld á húsini fyri at fáa tey at koma út, so hann eisini kundi fremja sína illgerð móti teimum… fleiri søgur eru



um hetta, at nógv krógvaðu seg handaru megin oynna, undir klettunum og í rivum. Onnur krógvaðu seg inni á WC´um, og aftur onnur vóru fangað í sínum goymistaði. Fleiri royndu at svimja til lands og fleiri fólk sum grunaðu, at har var okkurt illgrunavert á vási, sigldu út í bátum og bjargaðu fleiri menniskjalívum. Fleiri hugtakandi minnismerki eru, bæði heilt privat og inniliga persónlig og so tað almenna.



Hetta seinasta er í ”Lysningen”, tað er formað sum ein silvurringur, hongur uppi, og øll nøvnini og aldur teirra íð lótu lív, eru feld inn í ringin, soleiðis at sólin skínur ígjøgnum nøvnini. Sera hugtakandi og inniliga hjartanemandi… Utøya verður framvegis dúgliga nýtt av ungdómi, til summarlegur. Tó var eingin summarlega fyrstu 3 árini eftir illgerðina. Tey ungu í Norra hava avgjørt at terrorhandlingarnar skulu ikki sleppa at forkoma teirra lívsgleði, tað aktivt luttakandi lívið í einum frælsum demokratii, har samfelagsligt engagement er til (…)”.



## FELAGS YVIRLÝSING

Felags yvirlýsingin snúði seg hesaferð um at fordøma brot á fólkarættin og álop á heilsustarvsfólk:

## YVIRLÝSING FRÁ SJÚKRARØKTARETISKUM RÁÐUM Í NORÐANLONDUM

*Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsustarvsfólk, sum arbeiða fyri at bjarga mannalívum, eru í alt størri mun vorðin mál fyri álopum í konfliktum, har fólkarætturin og grundleggjandi menniskjavirði ikki verða vird. Sambært altjóða felagsskapum sum "Læknar uttan landamørk" eru hesi álop ein álvarsom hóttan móti bæði heilsustarvsfólkum og teirra møguleikum at røkja lívbjargandi arbeiði.*

*Hóast áheitanir frá ST um vápnahvíld í Miðeystri, verða áhaldandi umbønir um humanitera hjálp ikki tiknar til eftirtektar. Arbeiði hjá heilsufelagsskapum verður tarnað, og bráðneyðug neyðhjálp sleppur ikki fram til tey neyðstaddu. Nógv sivil fólk, sum sambært fólkarættinum hava rætt til vernd, mangla neyðuga hjálp og stuðul. Hetta er ein humaniter kreppa, sum krevur skjóta altjóða handling.*

*Verjan av heilsustovnum og sivilum undir vápnaðum konfliktum er ein grundleggjandi meginregla í fólkarættinum. Tá ið tøgn og passivitetur fær loyvi at ráða um hesi álop, er vandi fyri, at tey við tíðini verða góðtikin. Tí er tað av alstórum týdningi, at altjóða samfelagið stendur saman móti hesum gongdum og tryggjar, at meginreglurnar í fólkarættinum verða fylgdar.*

*Netverkið av Sjúkrarøktaretiskum Ráðum í Norðanlondum fordømir við hesum álopini á sjúkrahús, heilsustovnar, og heilsustarvsfólk í Gaza, á Vestara áarbakka og í Libanon. Somuleiðis fordøma vit harðskapi móti heilsustovnum og sivilum í londum sum Haiti, Kongo-kinshasa, Suðursudan, Miðafrikanska lýðveldinum, Bangladesh, Etiopia, Tchad, Afghanistan, Ukraina, Jemen og allastaðni, har slíkar hendingar fara fram. Vit kunnu ikki góðtaka álop á sjúkrahús yvirhøvur, og at sjúkrarøktarfrøðingar og heilsustarvsfólk eru í vanda fyri at verða dripin í royndini at bjarga lívi og limum. Vit kunnu heldur ikki góðtaka, at forðað verður fyri, at sivil fólk fáa ta verju, tey hava tørv á og rætt til.*

*Lilas Ali, forkvinna*
*"sjuksköterskornas etiska råd vid svensk sjuksköterskeförening"*

*Berit Liland, forkvinna*
*"Rådet for sykepleieetikk, Norsk sykepleirforbund"*

*Jana Mortensen, forkvinna*
*"Sjúkrarøktaretiska Ráðið"*

*Lisbeth Aaskov Falch, forkvinna*
*"Dansk sygeplejetisk råd"*

*Pauline Olesen, forkvinna*
*"Grønlands sygeplejetiske råd"*



Stutt eftir ráðstevnuna, kom forboðið hjá Taliban móti at loyva kvinnum atgongd til heilsufakligar útbúgvingar - eitt útbúgvingarøkið, sum annars hevur verið undantikið strongu lógunum í Afghanistan, sum sýta kvinnum rættin til útbúgving. Semja var tí í norðurlendska samstarvinum, at fordøma hetta forboðið.

## FORDØMING FRÁ SJÚKRARØKTARETISKUM RÁÐUM Í NORÐANLONDUM UM FORBOÐ MÓTI, AT KVINNUR FÁA ATGONGD TIL HEILSUFAKLIGAR ÚTBÚGVINGAR Í AFGHANISTAN.

*Sjúkrarøktaretisku Ráðini í Noregi, Svøríki Grønlandi og Føroyum vilja við hesum fordøma forboðið, ið forðar kvinnum at fáa atgongd til heilsufakligar útbúgvingar í Afghanistan. Hetta forboð er ikki bert eitt álvarsamt brot á grundleggjandi rættindi hjá kvinnum, men hevur eisini víðfevndar avleiðingar fyri heilsu og trivnað í øllum tí afghanska samfelagnum.*

*Kvinnur í heilsustørvum hava ein týðandi leiklut í heilsuskipanum, serliga í Afghanistan, har mentanarligar normar hava við sær, at kvinnur bert hava møguleika at fáa viðgerð frá øðrum kvinnum. Uttan kvinnulig heilsustarvsfólk verða nógvar kvinnur forðaðar í at fáa grundleggjandi heilsurøkt. Hetta hevur álvarsligar fylgjur við sær - serliga fyri barnakonur, nýføðingar og børn - eitt nú øktan deyðatíttleika, sum hevði kunnað verið fyribyrgt við atgongd til kvalifiseraða røkt. Harumframt ger forboðið verandi starvsfólkatrot enn verri, tí kvinnur eru ein týðandi partur av heilsugeiranum. Uttan teirra luttøku verður atgongdin til heilsutænastur munandi skerd fyri alt fólki.*

*Forboðið styrkir eina frammanundan rótsetta, kynsbundna ójavnvág og marginaliserar kvinnur enn*

*meira í samfelagnum. Við at forða kvinnum í at útbúgva seg og mennast fakliga, missa tær møguleikan at geva sítt íkast til menning av landinum. Hetta er tekin um ein skipaðan mismun, sum ikki bara undirgravar støðuna hjá kvinnum sum javnbjóðis borgarar, men eisini hóttir heilsustøðuna hjá fólkinum og sosiala javnvágina í landinum.*

*Undirritaðu Sjúkrarøktaretisku Ráðini heita á altjóða samfelagið um at taka stig ímóti hesi álvarsligu støðu. Vit eru stúrin um og vilja vísa okkara samkenslu við starvsfelagar okkara og kvinnurnar í Afghanistan, sum nú missa møguleikan at útbúgva seg og útinna sítt starv. Hetta er ein álvarslig hóttan móti javnrættindum, virðing og rættvísi – grundsúlunum í etiskari sjúkrarøkt.*



*Sjúkrarøktaretisku Ráðini í Noregi, Svøríki, Grønlandi og Føroyum*

# KARI MARTINSEN

Hin 10. oktober helt Kari Martinsen fyrilestur í Løkshøll og yvir 200 fólk komu at lurta. Hóast hon hvørki brúkti tekniskar snildir ella stór armsveiggj, ja hon nærmast flutti seg ikki á stóra pallinum í Løkshøll, so megnaði hon at rúnabinda fjøldina í nærum 3 tímar.

Yvirskriftin til fyrilesturin var "Tíðarakseleratión, resonansur og seinføri í røktarrúmum" við undirspurninginum: "Er lívgandi seinføri møguligt – seinføri við rúm fyri øðrum, við rúm fyri at sansa, lurta, síggja, lukta og merkja?"

Hon lýsti spurningin ígjøgnum tvær sjúklingasøgur, við støði í hugsanunum um tíðarakseleratión og resonans hjá týska sosiologinum Hartmut Rosa og tekstunum hjá danska teologinum K.E. Løgstrup um etikk og fantasi.

Onnur søgan gekk fyri seg í einum rúmi, merkt av seinføri, har røktin tók ta tíð hon tekur, og resonansur er millum sjúkling og sjúkrarøktarfrøðing.

Hin søgan gekk fyri seg í einum rúmi, merkt av tíðarakseleratión og fremmandagerð, men har hon við Løgstrup, Rosa og Foucault vísti á, at "onnur rúm" kunnu skapast í hesum sama rúmi og at resonansur er gjørligur hóast truplar umstøður.

Í fyrilestrinum brúkti hon rúma tíð at greiða frá, hvat tíðarakseleratión ger við bæði sjúklingar og starvsfólk og hvussu seinføri, fantasiur og tað at leggja merki til og uppdaga smá ting, kann verða eitt mótsvar og ein máti at protestera ímóti kravinum um tíðarakseleratión.

“Vit mugu hugsa tað óhugsandi” og “Tað týdningarmesta er at steðga á og lurta” vóru millum mongu boðskapir hennara.

Vit í SER eru so ógvuliga takksamar fyri, at Kari Martinsen vildi koma á vitjan og at sjúkrarøktarfrøðingar tóku so væl undir við tiltakinum. Men tað er nú ikki minni gott at vita sær, at Kari sjálv var ógvuliga fegin um vitjanina, og væl kundi hugsað sær at komið aftur. Vit hava tí framhaldandi samband við hana og tað er als ikki óhugsandi, at hon kemur aftur um eitt ár ella so.

# PODDAR

Í samband við vitjanina hjá Dorthe Birkmose og Kari Martinsen, gjørdu vit avtalu við Armgarð Arge og Kvf, um at gera samrøður við hesar báðar. Teir poddarnir eru millum annað at finna í poddrøðini ETOS, har hinir 4 poddarnir hjá okkum eisini eru at finna

# YOUTUBE

Framløgan við Kari Martinsen er eisini at finna á youtube kanal okkara, har aðrir áhugaverdar fyrilestrar eisini eru at finna

# NEVNDARVAL

Til aðalfundin hin 15 mars, verður aftur val til Sjúkrarøktaretiska Ráðið. 4 limir standa fyri valið hesuferð og evstamark til at boða frá, er hin 1. februar. Sí nærri lýsing her.

Fyri nærri kunning ella fyri at boða frá uppstilling, ber til at seta seg í samband við forkvinnuna Janu Mortensen á etikkur@sjukrarokt.fo



# VIÐ HESUM VILJA VIT Í SER TAKKA FYRI GOTT SAMSTARV OG GÓÐA UNDIRTØKU Í BRÁTT FARNA ÁRIÐ.

**Sjúkrarøktaretiska Ráðið**
Jana Mortensen, forkvinna
Lilian Dam, næstforkvinna
Birna Mohr Joensen, skrivari
Marjun Thomsen, ráðslimur
Katrine Klein Arnbjerg, ráðslimur
Ingun Gaardbo, ráðslimur
Eva Mortensen Holm, ráðslimur

Sjúkrarøktaretiska Ráðið

Meira kunning um Sjúkrarøktaretiska Ráðið fæst á heimasíðuni hjá Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar: ***www.sjukrarokt.fo***

Vit eru eisini at finna á Facebook: Sjúkrarøktaretiska Ráðið ***https://www.facebook.com/groups/524279708341248/***

Samband fæst við ráðið við telduposti á: ***etikkur@sjukrarokt.fo***

annijanni.fo